## DAGSINS MEINING

# Ein glotti

Allur heimurin hevur nú í trý ár sitið hendur í favn, meðan fólk í túsundatali eru deyð í hungri i Darfour landspartinum í Sudan. Orsøkin til neyðina er, at stjórnin í Sudan, sum er arabisk muslimsk, hevur rikið eitt harðrent kríggj móti kristna fólkinum av afrikanskum uppruna í Darfour landspartinum. Her er sostatt talan um eina etniska og mentanrliga uppgerð. Fólkið, ið hevur roynt at verja seg móti harðskapinum frá stjórnini, sum so hevutr hevnt seg við at forða fyri tí syndri av altjóða hjálp, sum hóast alt hevur verið send til Darfour.

ST hevur til fánýtis roynt at fáa ein enda á øllum ruðuleikanum og allari neyðini. Í hesum høpi hevur ST aðalskrivarin, norðmaðuirn, Jan Egeland gjørt eitt ómetaliga stórt diplomatiskt og humanitert arbeiði. Jan Egeland hevur verið ótaldar ferðir í Darfour. Hann hevur ferðast kring allan heimin til tess at útvega mat og pening, men striltið hevur gingið at fáa heimin at rakna við. Tað er sum allur heimurin hevur fingið nóg mikið av neyð og elendigheit. Heldur ikki vit her í Føroyum hava givið hesari neyðini ans, hóast øll, sum síggja BBC ella CNN hava fingið hesa neyð inn í stovur okkara. Hetta er eisini galdandi fyri landsstýrið, sum bert tykist áhugað í altjóða hjálp, um nakrir molar samstundis kunnu detta av til føroyska vinnulívið. Noreg er sum vanligt eitt undandtak. Norska stjórnin, Stoltenberg so væl sum Bondevik hevur bakkað Egeland og ST upp við peningi, mati, heilvági og diplomatiskum átøkum.

Men nú tykist vent í holuni, og aðrir tónar eru knappliga at hoyra. USA er raknað við og er av øllum alvi farið til verka við hjálp eins væl og diplomatiskum átøkum. Eitt nú stuðlar Bush av fullum huga ST í royndunum at skapa frið og fyri at fáa matvøruhjálpina fram til tey neyðstøddu. Tað er torført at skilja hesa kúvending. Onkur vil vera við, at hon stavar frá, at altjóða films- og poppstjørnur eru farnar at virka fyri teimum neyðstøddu. Rætt er, at hesi tiltøk hava skapt ómetaligan ans kring allan heim fyri neyðini í Darfour og nógv lond eins væl og hjálparfelagsskapir eru farin at ressast. Politiska kúvendingin hjá Bushstjórnini hevur veruliga gjørt munin, og nú er ein glotti at hóma hjá neyðstadda kristna fólkinum í Darfour.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# John Johannessen mótmælti fangaflutningi


**JOHN JOHANNESSEN**
løgtingslimur fyri Javnaðarflokkin
john@john.fo




Í sambandi við, at løgmaður stutt eftir nýggjár ráðførdi seg við uttanlandsnevndina um spurningin at endurnýggja hernaðarliga flúgviloyvið hjá USA í føroyskum loftrúmi, mótmætli eg sum einsamallur samgongulimur ólógligum fangaflutningi í føroyskum loftrúmi. Niðanfyri endurgevi eg skrivið, sum eg sum limur í uttanlandsnevndini sendi løgmansskrivstovuni umvegis løgtingsskrivstovuna í februar

Tann 29. januar 2005 skrivaðu løgmaður og danski uttanríkisráðharrin undir sonevnda Fámjinsskjalið, sum er felagslýsing, ið millum annað fevnir um at víðka luttøku og ávirkan Føroya á uttanríkis- og trygdarpolitisk mál. Í felagslýsingini eru hesi mál lýst soleiðis:

• I forvaltningen af udenrigs- og sikkerhedspolitiske spørgsmål af betydning for Færøerne er det naturligt, at Færøerne medinddrages og har medindflydelse.

• Der er tale om ægte medinddragelse og medindflydelse med sigte på ligeværdighed i alle spørgsmål hvor Danmark og Færøerne i fællesskab er inddraget.

Á fundi við uttanlandsnevndina 30. mars 2005 nágreinaðu danski uttanríkisráðharrin, Per Stig Møller, og løgmaður avtaluna um "ægte medinddragelse og medindflydelse". Hetta vóru orð, sum skuldu takast í størsta álvara, varð sagt samstundis sum dentur varð lagdur á, at uttanlandsnevndin eisini átti at kenna sína ábyrgd at uppfylla hetta endamál.

Í hesum førinum biður USA gjøgnum danskar myndugleikar um loyvi til hernaðarliga flúgving við m. ø. vandamiklum góðsi gjøgnum føroyskt loftrúm fyri 2005 í sambandi við støðuna í Irak. Í 2002 vildi Javnaðarflokkurin ikki geva sítt samtykki orsakað av, at ST ikki hevði góðkent álop á Irak. Í dag er støðan ein onnur, nú talan er um uppafturbygging av Irak, sum altjóða samfelagið er við í. Tískil eiga føroyskir myndugleikar ikki at seta seg ímóti at flogið verður gjøgnum føroyskt loftrúm fyri at hjálpa irakska fólkinum.

Kortini eiga føroyskir myndugleikar ikki treytaleyst at viðmæla USA flúgviloyvi. Í grein í enska blaðnum The Guardian 19. januar 2006 undir heitinum "Torture flights: what No 10 knew and tried to cover up" verður avdúkað, at londini sum vóru við í Irak krígnum hava eina avtalu um, hvussu tey fjala út yvir, at tey loftvegis flyta fangar til lond í Eysturevropa at verða píndir. Fleiri spurningar um hetta sama eru eisini reistir á fólkatingi, har danski uttanríkisráðharrin enn ikki beinleiðis hevur kunnað afturvíst, at USA flytur fangar úr USA til Eysturevropa at verða píndir.

Havandi í huga, at slíkur flutningur helst fer fram í føroyskum loftrúmi, kenni eg tað sum mína skyldu sum lim í uttanlandsnevndini at taka orðini um "ægte medinddragelse og medindflydelse" í størsta álvara og í fyrsta lagi krevja eina ítøkiliga frágreiðing um møguligan flutning av fangum í føroyskum loftrúmi.

Í øðrum lagi er mín støða, at vit í svari til fyrispurningin um at geva USA hernaðarligt flúgviloyvi í føroyskum loftrúmi senda ein greiðan politiskan boðskap um, at vit ikki góðtaka, at føroyskt loftrúm verður nýtt sum liður í ólógligari pínslu av fangum. Tað er jú beinleiðis í stríð við fólkarættin at flyta ein persón til eitt land, har vandi er fyri, at viðkomandi verður píndur.

Eftir míni fatan er tað okkara skylda at gera vart við hesi viðurskifti. Um vit tiga og samtykkja, er stórur vandi fyri at vit eru óbeinleiðis við til at ganga ímóti rættinum hjá hvørjum einstakum menniskja.

# Ódemokratisk framferð í fíggjarmálaráðnum

**TÍÐINDASKRIV**
*Lærarar á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya*

Lærarar á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya, ið hava nomið sær víðariútbúgving á kandidat og masterstøði, gera hervið vart við sína ónøgd í samband við broytingar í lønarútgjaldingum, sum Fíggjarmálaráðið setti í verk í mars mánað. Talan er um ein lønarniðurskurð, sum fyri nakrar lærarar er 2000 kr. um mánaðin og sum nú, fyri triðju ferð, kemur til útgjalding.

Fíggjarmálaráðið hevur av sínum eintingum gjørt egnu tulkingar av sáttmálanum millum ráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og -brúkar hesar sum grundgeving fyri at gera nevndu niðurskurðir í lønarútgjaldingunum, sum lærarnir meta er greitt brot á sáttmálan.

Avgerðin í málinum er komin heilt óvart á lærararnar á skúlanum. Boðini komu, um teldupost, tá lønarbroytingarnar vóru settar í verk og sostatt má sigast, at talan er um eini "harraboð" frá Fíggjarmálaráðnum.

Lærararnir vilja hervið harðliga mótmæla framdu lønarniðurskurðum og ódemokratisku mannagongdini í málinum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.